# Røða síðsti skúladagur

Hey góðu tit

Hetta er mín síðsti skúladagurin á hesum skúlanum á hesum sinni. Í tí sambandi havi eg hugsað um, hvat eg skuldi siga í hesari røðuna og eg kom fram til, at eg havi nógv at siga takk fyri, aftaná at hava gingið her í 3 ár. Tað hava vit øll nokk. Ikki bara aftaná vit hava gingið her, men yvirhøvur hava vit nógv at vera takksom fyri.

Í náttborðinum í mínum kamari havi eg eina takksemisbók. Eg royni javnan at skriva ymiskt í har, sum eg eri takksom fyri og so sum eg eri glað fyri. Tað er t.d. fólk, løtur og upplivingar. Eg eri vís, at vit øll hava nógv meira at vera takksom fyri, enn vit geva okkum far um. Vit noyðast ikki at bara vera takksom fyri okkara lívsneyðugu tørvir. Vit kunnu vera takksom fyri ALT. Vit kundu skrivað ein óendaligan lista, um man byrjaði. Um eg skrivi í mína takksemisbók aftaná ein góðan dag kann eg skriva nøvn, eitt bestemt klemm ella ein bestemtur drekkamunnur.  Eg skrivi bara ymiskt eg eri takksom og glað fyri, einki keðiligt. Tað keðiliga er undirforstaðið, men tað positiva má dyrkast. Kanska serliga aftaná ein ringan dag. tí tá hevur man serliga tørv á at hugsa um, hvat man hevur verið takksamur fyri tann dagin, og tað er ókey at skula hugsa seg um í eina løtu. Men man finnur altíð okkurt, um man leitar.

Tað vil siga, at tá eg eri liðug við bókina, havi eg eina samling av øllum teimum góðu løtunum eg kann hyggja aftur á. Bæði á góðum og ringum døgum.

Tí í roynd og veru hava vit jú so nógv at vera takksom fyri.

Vit búgva í Føroyum. Vit liva í einum demokratiskum landi og hava eitt vælvirkandi demokrati, vit hava eitt gott heilsuverk, vit hava góðar búskaparligar tíðir. Vit hava eina vakra náttúru, vit síggja hav, vit kenna okkara familju, tey flestu hava garanterað eina song, klæðir, mat, vit hava natúrliga sosialar relatiónir, vit kunnu ganga til frítíðarítriv o.s.fr. Fyri okkum er alt hetta ein sjálvfylgja. Tað er tað als ikki nógva aðrastaðni.

Tá man hevur tað so gott sum vit hava tað, kann tað onkuntíð vera lætt at blíva fastur í at vera ónøgd í luksusproblemum. Eg kenni tað væl frá mær sjálvari. Summi sleppa ikki at ganga í skúla orsaka av kyn, fátækradømi ella fjarstøðu. Vit sleppa øll at ganga í skúla, hóast allar umstøður, ókeypis og vit fáa enntá studning/“løn” fyri tað, men enn ber til at vera ónøgdur við mongdina, og at man ikki fær tað, tá áðrenn man er 18.

Vit ganga eisini í einum skúla, har tað eru meira enn 1500 fólk, har alt ber til og sum tað krevur nógv góð fólk, sum gera ein stóran innsats, fyri at fáa alt at rigga.

Vit hava ein køk, sum hvønn dag ger fleiri døgurðar enn nakar annar køkur í landinum og tit fáa tað altíð til at smakka væl. Eg veit at fólk ofta tosa um, hvussu væl tað smakkar hjá tykkum. Vit hava vaskifólk, sum vaska skúlan allan dagin. Eg veit ikki hvussu tað hevði skula verið uttan tykkum. Vit hava húsavørðar, sum hanga perur og pynt upp á jólum hvørt ár, sum vit øll fáa gleði av og gera nógv arbeiði, sum vit neyvan hugsa um. Vit hava eina fyrisiting, sum fær alt at mala runt. Vit hava eina lestrarvegleiðing, sum er her fyri at vegleiða okkum ígjøgnum miðnám og tað tað innber. Vit hava fitt móttøkufólk, sum altíð blíð og klár at hjálpa. Vit hava lærarar, sum brúka teirra lív uppá at læra okkum tað tey vit og at víðka okkara sjónarring.

Vit hava so nógv at vera takksom fyri, og vit mugu minnast til at úttrykkja tað. Eg veit, at eg nokk burdi gjørt tað meira sjálv, so kann byrja her.
Eg havi verið her í 3 ár, og tí havi eg nógv at takka øllum hesum fólkunum fyri. Takk fyri øll í køkinum. Takk fyri allan tann vælsmakkandi matin - tit eru so røsk, tað hopi eg at tit fáa at vita ofta. Vaskifólk, takk fyri at tit halda skúlan so reinan og orsaka fyri, at vit ikki eru nóg røsk at koyra stólarnar upp. Tit gera eitt kempi arbeiði. Góðu húsavørðar, takk fyri at tit gera ta myrku jólatíðina so hugnaliga. Fyrisitingin, takk fyri, at tit fáa alt at ganga upp. Takk til móttøkufólkini, at tit altíð hava verið so fittar og hjálpsamar, tá eg eri komin niðan til tykkum. Takk til leiðsluna fyri alt samstarv og tá tað ikki hevur verið beinleiðis samstarv, men mótspæl. Takk til allar lærarar eg havi havt, takk fyri alt tit hava lært meg og hava givið mær. Og eisini - takk fyri allar møguleikarnar eg havi gingið ímeðan eg havi gingið her og takk fyri at eg eri sloppin at menna mínar eginleikar og meg sum persón. Takk fyri øll sum eg havi havt samband við og sum hava verið so skjót at hjálpa við einhvørjum, um eg havi mangla útgerð, góð ráð, hjálp við onkrum ella aðra hjálp til okkurt tiltak. Og tað meini eg veruliga. Vit hava eitt heilt samfelag inni í hesum skúlanum og fólk eru so klár at hjálpa, so umtit hava hugskot, ikki haldið tykkum aftur! Og ikki minst, takk til allar næmingar og floksfelagar.

Um vit ikki høvdu lirað allar pengarnar av til fótbóltsdystin, høvdu tit øll sum eg havi nevnt skula fingið eitt kempi blómutyssi!

At vera takksom og at seta prís upp á ting, hendir ikki av sær sjálvum, tað krevur venjing. Tað er aldrin for seint at byrja og heldur aldrin ov tíðliga. So byrja nú. Sig við tey rundan um teg, at tú ert góð/ur við tey. Takka tínum lærara, at hon ella hann hava verið ein góður lærari. Royn og minst til hvønn dag, hvat tú kann vera takksamur fyri í dag. Ikki bara í dag, men í gjár, og hald fram at gera tað. Skriva tað kanska niður.

Eg havi eina heila bók við tí, sum eg eri takksom fyri. Og vit hava øll eina slíka bók onkustaðni inni í okkum. vit skulu bara minnast til at lesa og skriva í henni hvønn dag.